**SVIMJISAMBAND FØROYA**
Faroe Islands Aquatics Federation (FRO)
Fédération des Îles Féroé de Natation

Limaskapur/Affiliation:
Ítróttasamband Føroya (ÍSF)
Nordic Swimming Federation (NSF)
European Aquatics (LEN)
World Aquatics (AQUA)

Svimjisamband Føroya bjóðar hervið til

# Aldursbólkameistarastevnu 2024



| | |
|---|---|
| **Dagfesting**: | **20. - 21. apríl 2024** |
| **Svimjihøll**: | Klaksvíkar Svimjihøll |
| | 6 x 25m innandura svimjihylur |
| **Adressa**: | Waagsteinsgøta, FO-700 Klaksvík, www.svim.fo |
| **Luttakarar**: | Øll sum hoyra til bólk 1, 2, 3 og 4 hjá SSF |
| | Sí Reglugerð um bólkabýti og Reglugerð fyri Meistarastevnur |
| **Innboðin feløg**: | FLOT, Fuglafjarðar Svimjifelag, Havnar Svimjifelag, |
| | Reysti, Suðuroyar Svimjifelag, Ægir, Hellufossur |

**í samstarvi við**

ATLANTIC AIRWAYS

**Týðandi dagfestingar**

| | |
|---|---|
| **Hósdag 21. mars 2024**<br>(30 dagar áðrenn stevnu) | **Formlig innbjóðingarfreist** |
| **Sunnudag 7. apríl 2024 kl 06:00**<br>(13 dagar áðrenn stevnu) | **Rættstundis tilmeldingarfreist**<br>(kr 25/start hjá einstaklingum, kr 100/start hjá liðsvimjingum) |
| **Sunnudag 7. apríl 2024**<br>(13 dagar áðrenn stevnu) | Feløgini fáa lista við sínum egnu tilmeldingum |
| **Fríggjadag 12. apríl 2024**<br>(8 dagar áðrenn stevnu) | **Síðsta freist at senda dómaralista til SSF** |
| **Leygardag 13. apríl 2024 kl 06:00**<br>(7 dagar áðrenn stevnu) | **Seina tilmeldingarfreist** (kr 100/single, DKK 400/relay)<br>(kr 100/start hjá einstaklingum, kr 100/start hjá liðsvimjingum)<br>Síðsta freist at senda dómaralista til World Aquatics |
| **Leygardag 14. apríl 2024**<br>(6 dagar áðrenn stevnu) | Feløgini fáa rokning fyri sínar tilmeldingar |
| **Mikudag 17. apríl 2024**<br>(3 dagar áðrenn stevnu) | **Gjaldsfreist at gjalda fyri tilmeldingar** |
| **Hósdag 18. apríl 2024**<br>(2 dagar áðrenn stevnu) | **Almannakunngering av startlista** |
| **Fríggjadag 19. apríl 2024**<br>(1 dag áðrenn stevnu) | **Síðsta frámeldingarfreist**, til kappingar aðrar enn finalur |
| **Leygardag 20. apríl 2024**<br>(Fyrsti stevnudagur) | |

ATLANTIC AIRWAYS

## Stevnupartar

| | |
|---|---|
| 1. partur: | **Dagur 1 frá kl 09:30** - Innleiðandi riðlar |
| 2. partur: | **Dagur 1 frá kl 16:00** - Beinleiðis finalur |
| 3. partur: | **Dagur 2 frá kl 09:00** - Innleiðandi riðlar |
| 4. partur: | **Dagur 2 frá kl 14:30** - Beinleiðis finalur |

Høllin letur upp til upphiting 1½ tíma áðrenn hvønn stevnupart, dag 2 tó 1 tíma áðrenn

## Kappingarskrá

| | **Dagur 1** | **Dagur 2** |
|---|---|---|
| **Morgun:**<br>Beinleiðis finalur hjá bólki 1-2<br>Innleiðandi riðlar hjá bólki 3-4<br><br>Innleiðandi er ikki bólkað | 01 & 02 - 50 firvald B1-4<br>03 & 04 - 100 rygg B2-4<br>05 & 06 - 200 frí B2-4<br><br>09 & 10 - 100 bringa B2-4<br>11 & 12 - 50 frí B1-4<br>07 & 08 - 200 blandað B3-4<br><br>13 & 14 - 4x50 frí B1-4 | 23 & 24 - 50 br B1-4<br>25 & 26 - 200 rygg B2-4<br>27 & 28 - 100 firvald B2-4<br><br>29 & 30 - 200 bringa B3-4<br>31 & 32 - 100 frí B1-4<br>33 & 34 - 100 blandað B2-4<br>35 & 36 - 50 rygg B1-4<br><br>37 & 38 - 4x50 blandað B1-4 |
| **Seinnapart:**<br>Bólkaðar finalur hjá bólki 3-4 | 19 & 20 - 25 rygg B1-2*<br>15 & 16 - 800 frí B4<br>21 & 22 - 25 firvald B1-2*<br>17 & 18 - 200 firvald B3-4<br>03 & 04 - 100 rygg B3-4<br>01 & 02 - 50 firvald B3-4<br><br>05 & 06 - 200 frí B3-4<br>09 & 10 - 100 bringa B3-4<br>11 & 12 - 50 frí B3-4<br><br>13 & 14 - 4x50 frí B3-4 | 41 & 42 - 25 frí B1-2*<br>39 & 40 - 400 frí B3-4<br>43 & 44 - 25 bringa B1-2*<br><br>33 & 34 - 100 blandað B2-4<br>23 & 24 - 50 bringa B3-4<br>27 & 28 - 100 firvald B2-4<br><br>31 & 32 - 100 frí B3-4<br>45 & 46 - 400 blandað B3-4<br>35 & 36 - 50 rygg B3-4<br><br>37 & 38 - 4x50 blandað B3-4 |

Kappingarnar hjá gentum eru ólíka tøl (1, 3, 5, …) og hjá dreingjum líka tøl (2, 4, 6, …)

Um 6 ella færri hava tilmeldað eina kapping (t.d. 50 frí), er ikki tørvur á innleiðandi umfari.

Allar kappingar hjá bólki 1 og 2 verða avgreiddar sum beinleiðis finalur.

Kappingar á teinum 200m og longri, verða avgreiddar sum beinleiðis finalur, tó undantikið 200 frí.

Í 800 frí og 400 blandað er luttøkan avmarkað til ein riðil per kyn og aldursbólk.

*25m-kappingarnar eru stuttleikakappingar, úrslitini verða ikki FINA-góðkend t.d. á SwimRankings

## Aldursbólkar

- Bólkur 1: Svimjarar føddir í 2016 ella seinni
- Bólkur 2: Svimjarar føddir í 2014 ella 2015
- Bólkur 3: Svimjarar føddir í 2012 ella 2013
- Bólkur 4: Svimjarar føddir í 2010 ella 2011

Bólkarnir kunnu verða savnaðir í sama riðil. Úrslit og heiðursmerki verða bólkabýtt

## Skipan av upphitingini

**Dagur 1**

- Kl 09:00-09:00 Bólkur 3 & 4
- Kl 09:00-09:30 Bólkur 1 & 2
- Kl 14:30-15:30 Bólkur 3 & 4
- Kl 15:30-16:00 Bólkur 1 & 2

**Dagur 2**

- Kl 08:00-09:00 allir bólkar
- Kl 13:00-14:00 Bólkur 3 & 4
- Kl 14:00-14:30 Bólkur 1 & 2

## Tekniskir fundir

Tekniskur fundur fyri dómarar er í svimjihøllini 1 tíma áðrenn hvønn stevnupart
Tekniskur fundur fyri venjarar er í svimjihøllini 1½ tíma áðrenn fyrsta stevnupart

## Stjórn á stevnuni

Kappingarleiðari er John D. Olsen or stevnuskrivari Ólavur Hansen.
Yvirdómari er Rúni Gaardbo og startari NN.

## Dómarar

Føroysku feløgini skulu møta við fylgjandi fólki til uppgávurnar sum tíðtakarar, vendidómarar og svimjidómarar: HS, SuSvim og Ægir 5 fólk til hvønn stevnupart; FLOT, FS, Reysti og Hellifossur 2 fólk til hvønn stevnupart. Nøvnini skulu sendast til ssf@ssf.fo í seinasta lagi til ásettu síðstu freist at senda inn dómaralista til SSF.

## Tilmeldingar

Tilmeldingarfíla í Grodan-sniði verður løgd á data.tempus.fo í seinasta lagi til formligu innbjóðingarfreist. Tilmeldingar eiga at gerast á data.tempus.fo til ásettu rættstundis tilmeldingarfreist.

Hvørt felag fær dagin eftir rættstundis tilmeldingarfreist sínar tilmeldingar aftur sum innlisnar í stevnuforritið, at kanna og um neyðugt rætta. Seinar tilmeldingar kunnu gerast á data.tempus.fo fram til seinu tilmeldingarfreist, tá ið læst verður endaliga fyri tilmeldingum og møguligum útskiftingum.

## Tilmeldingartíðir

Tilmeldingar skulu vera við tíðum svomnar í hesum kappingarárinum, tvs. síðani 1. september 2023. Um svimjarin ikki hevur nakra tíð, so kann meldast til við ongari tilmeldingartíð.

## Luttøkugjald

Luttøkugjaldið er kr 25 fyri hvønn start hjá einstaklingi og kr 100 fyri hvønn start hjá liðsvimjing, fram til rættstundis tilmeldingarfreist. Aftaná tað er luttøkugjaldið kr 100 fyri hvønn start hjá einstaklingi og kr 400 fyri hvønn start hjá liðsvimjing, fram til seinu tilmeldingarfreist.

SSF ger dagin eftir seinu tilmeldingarfreist upp luttøkugjøld fyri svimjarar og liðsvimjingar hjá feløgunum, til felagið at gjalda í seinasta lagi til ásettu gjaldsfreist, við bankaflyting til Svimjisamband Føroya á konto 6460 - 151.845.5 í BankNordik.

Um luttøkugjald ikki er goldið tá luttakaralistin skal almannakunngerast, verður felagið strikað av luttakaralistanum.

Goldin luttøkugjøld verða ikki endurgoldin, uttan so at talan er um tekniskan feil, so sum at tann ið flutti kom til at skriva skeiva upphædd í flytingini.

## Frámeldingar

Frámeldingar skulu gerast umvegis venjara-appina app.livetiming.se ella við telduposti til stevnur@ssf.fo. Brúkaranavn og loyniorð til venjara-appina verða send feløgunum tá ið tilmeldingarnar eru innlisnar í stevnuforritið. Burturmist ella gloymt loyniorð fæst við at senda teldupost til stevnur@ssf.fo.

Feløg kunnu frítt melda svimjarar og lið frá, fram til síðstu frámeldingarfreist. Feløg kunnu eisini frítt melda svimjarar og lið frá finalu, fram til 30 min. eftir viðkomandi innleiðandi stevnupart.

Aftaná hetta, má felagið vísa á serliga, óvæntaða orsøk, um ikki væntandi uppmøting skal geva bót. Hesar orsakir kunnu t.d. vera brádliga íkomin sjúka, skaði, ella persónlig orsøk sum ikki ynskist lýst. Felagið skal lata stevnuleiðsluni hesa frámelding, við grundgeving um orsøk, á skrift í seinasta lagi 30 minuttir aftaná viðkomandi start.

Svimjarar sum á hendan hátt eru frámeldaðir aftaná røttu frámeldingartíð, eiga ikki longur at luttaka á stevnuni, uttan við serligari góðkenning frá stevnuleiðsluni.

Væntandi ella ikki góðtikin frámelding, viðførir bót á 500 kr pr start, eins og luttøka í kapping aftaná væntandi uppmøting altíð vil útloysa bót á 500 kr pr start í øllum tí sum viðkomandi ikki møtti til.

## Dopingeftirlit

Allar svimjistevnur undir SSF eru undir dopingeftirliti av Anti Doping Danmark (ADD), sum lýst í dopingreglugerð ÍSF: https://isf.fo/antidoping/dopingreglugerd/.

## Klagur

Møguligar klagur skulu stílast til svimjinevnd SSF, við gjaldi á kr 500 í veð.
Um klagan ikki fær viðhald, so fellur hendan trygd til SSF.
Um klagan fær viðhald, so verður hon endurgoldin.

## Koronareglur

Hendan stevna verður fyriskipað sambært galdandi almennu koronatilmælum, sí https://korona.fo/tilmaeli?_l=fo

ATLANTIC AIRWAYS

## Beinleiðis úrslit og sjónvarping

Við fyrivarni fyri tekniskum trupulleikum, verða øll úrslit frá hesi stevnu at síggja beinleiðis á www.livetiming.se og live.swimify.com, eins væl og aftaná á ssf.fo og swimrankings.net

Ætlanin er eisini at stroyma frá hesi stevnu á YouTube-rásini hjá SSF

## Samband

Spurningar og viðmerkingar kunnu stílast til ssf@ssf.fo

## Gjaldsupplýsingar

Svimjisamband Føroya

P.O. Box 1329, FO-110 Tórshavn

BankNordik 6460 – 1518455

SWIFT: FIFBFOTX

IBAN: FO0764600001518455